**Føðingar**
25. mars fingu Mia og Steen Sørensen, Trongisvágur, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3644 gr.

28. mars fingu Maika L. Samuelsen og Niels Kári Nielsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3600 gr.

28. mars fingu Joan Hvidbro og Flemming Wismann, Skodsborg, DK ein son. Hann var 40 cm. langur og vigaði 1590 gr.

30. mars fingu Marjun Andersen og Einar Jacobsen, Syðrugøta, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2450 gr.

30. mars fingu Birna Nielsen og Kjartan E. Nielsen, Saltangará, ein son. Hann var 54 cm.langur og vigaði 3850 gr.

3. apríl fingu Lydia og Janus Joensen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3730 gr.

3. apríl fingu Durita og Rúni Nolsøe, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3500 gr.

3. apríl fingu Oydis Petersen og Tommy Næs Djurhuus, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3490 gr.

7. apríl fingu Fríðbjørg H. og Erling Joensen, Kambsdalur, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3250 gr.

7. apríl fingu Sólvá í Selvindi og Leivur Justinussen, Strendur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3700 gr.

7. apríl fingu Bjarta og Jónfinn Olsen, Miðvágur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4550 gr.

8. apríl fingu Jórun og Absalon Wolles, Eiði, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3600 gr.

9. apríl fingu Turið og Jón Nónklett, Rituvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3000 gr.

10. apríl fingu Evie og Jonathan Warner, Sandur, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4260 gr.

**Prógv**
Sonni Sandá úr Vági, búsitandi í Ringe á Fyn, varð útlærdur sum málari og fekk sveinabrævið á Odense Tekniske Skole 14. mars 2008. Hann lærdi hjá Årslev Malerforretning.

Árni Gilli Olsen úr Tórshavn hevur í januar 2008 lokið prógv sum Bachelor í Business Administration við sergrein í Marketing frá European University í Barcelona. Tey fyrstu tvey árini las hann á Hawaii Pacific University í Honolulu.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 13. apríl hava Gudrun og Eli Olsen, Hvalba, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Roynhøllini 12. apríl kl. 18 fyri innbodnum.

**Brúdleyp**
Leygardagin 12. apríl klokkan 14.00 giftast í Vesturkirkjuni í Havn: Eva Kristina Árting og Martin Mørk.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!





# Broytt býarmynd

Her eru tvær myndir av Kongabrúnni, Geilini og Ósanum á Eystaru Vág í Havn. Tær eru tiknar niðri við Ósan á Kongabrúnni í Havn í 1876 og 2005. Staðarnøvnini »í Tronganum« og »í Geil« síggjast fremst á ovaru myndini.

Øll húsini á ovaru myndini eru so við og við tikin burtur, og eru nýggj hús komin ístaðin. Einki av teimum gomlu húsunum sæst á nýggjaru myndini, tó at farvegurin av Handilsforeningini sæst, seinni rópt hjá Essaba og síðani Café Nátúr. Hesini húsini eru bygd í 1892 – partvís uppíbygd og partvís á grundina frá øðrum gomlum húsum, eitt nú Stórustovu.

Gamla myndin er helst tikin út gjøgnum vindeyga í einum av teimum gomlu húsunum í Gongini, har Sjóvinnubankin seinni bygdi. Fremst sæst hellan undir húsunum har, rópt "undir Kjallara". Húsini fremst í myndini eru Baianstova. Fólkini fluttu úr Baianstovu í 1877 niðan í Guttastovu í Gongini, sum síðani hevur verið rópt Baianstova. Handilsfelagið hjá Jørgen Bech & Sønner keypti húsini, og vórðu tey tikin niður og nýggj pakkhús bygd á staðnum. Tað var tað húsið, sum seinni var rópt Grøna Pakkhús ella Pakkhúsið hjá Carl á Lag, sum varð tikið niður umleið 1970.

Ytst høgrumegin sæst Kongabrúgvin – steinsetingin undir neystunum og niðan millum Baianstovu og Geilina. Kongabrúgvin var gjørd í sambandi við fyrstu kongavitjan í Føroyum, sum var 25. juli í 1874, tá Christian IX kongur og Valdemar Prinsur vitjaðu í Føroyum á veg til 1000 ára haldið fyri landnámi í Íslandi.

Ósin fór undir heilt í 1929 – og seinni er navnið Kongabrúgvin komið at fevna um hetta øki eisini, tó at "tann gamla Kongabrúgvin" man vera áleið framman fyri handilinum hjá Niels L. Arge og niðan í Kopargøtu.

*Ovara myndin: Esther Djurhuus*
*Niðara myndin: Birgar Johannessen*